LM-053/2022

Fylgiskjal 6

Skráseting Føroya

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Gongin 7
Postboks 377
110 Tórshavn

Dagfesting: 20. februar 2023
Journal nr.: 23/00054-2

Viðgjørt: Súsanna Leo

Viðmerkingar frá Skráseting Føroya til uppskot til løgtingslóg um grundvatn

Skráseting Føroya hevur fingið omanfyri standandi uppskot til hoyringar tann 24. januar 2023.

Fyrisitingarligu heimildirnar sbrt. løgtingslóg nr. 53 frá 28. apríl 2000 um vatnið í sumbiarbergholinum, sum broytt við løgtingslóg nr. 55 frá 16. mai 2006 vóru latnar Skráseting Føroya við delegatión 8. apríl 2016.

Í uppskotinum § 14, stk. 2 verður ásett, at tá øll loyvi, ið eru givin við heimild í løgtingslóg um vatnið í sumbiarbergholinum, eru endurnýggjað, latin inn aftur ella tikin aftur, verður løgtingslóg um vatnið í sumbiarbergholinum sett úr gildi við kunngerð landsstýrismansins.

Sambært lógaruppskotinum verður tað Jarðfeingi ið fer at fyrisita heimildirnar hjá landsstýrismanninum í lógini um grundvatn. Skráseting Føroya hevur áður víst á, at fyrisiting at lóggávu viðvíkjandi grundvatni sannlíkt liggur betur hjá øðrum fakmyndugleika. Skráseting Føroya metir, at tað er ein góð loysn at tað framyvir verður fakmyndugleikin Jarðfeingið, sum frammanundan hevur við ráevni í undirgrundini at gera, eisini fer at umsita lóggávuna viðvíkjandi grundvatnið í Føroyum.

Lógin um vatnið í sumbiarbergholinum er ein serlóg, ið einans regulerar loyvi til vatnið, ið rennur ella kann vinnast burtur úr rivum og lekum í fjallinum í einum ítøkiligum bergholi, umframt at henda lógin eisini manglar ásetingar, soleiðis at loyvi kann umsitast á nøktandi hátt. Tískil heldur Skráseting Føroya at tað er tørvur á og kærkomið at fingið verður til vega lóggáva, ið ásetur greiðar reglur um, hvussu loyvi kann veitast at gagnnýta grundvatn í Føroyum.

Vinarliga

Súsanna Leo
deildarleiðari